# Skipasmiðjan søkir goymslulærling

Hevur tú hug at koma í goymslulæru á Tórshavnar Skipasmiðju?

Tú hevur miðnámsútbúgving og eisini kundu vit hugsa okkum, at tú
- Ert opin og hevur lætt við at samskifta
- Hevur góðan teldu- og talførleika
- Ert framfýsin og ágrýtin

harumframt er tað ein fyrimunur um tú hevur áhuga fyri mekaniskum og el-lutum. Í lærutíðini fert tú at starvast á ymsu goymslunum hjá fyritøkuni, mest í Havn, men eisini á Skála Skipasmiðju og FJM í Runavík.

Góður møguleiki er fyri føstum starvi eftir lokna lærutíðø

Skrivlig umsókn við avriti av prógum o.ø. skal sendast til:

Tórshavnar Skipasmiðju
att.: Gunnvør Balle
Postsmoga 65
110 Tórshavn

Í seinasta lagi 11. mars 2005. hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi, kanst tú venda tær til Gunvør Balle og Boga Kirke á tlf. 301100.

Á P/F Tórshavnar Skipasmiðju starvast um 250 fólk við at veita tænastur og sølu av eykalutum til skipaflotan og vinnuni á landi. Hesar tænastur umfata mekaniskar, stál, timbur, máling, beding, tekniska ráðgeving og beinleiðis sølu av goymslu. Skipasmiðjan hevur deildir í Havn, á Skála, í Vestmanna og í Runavík.

TÓRSHAVNAR SKIPASMIÐJA

www.faroeyard.fo

---

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# PhD-undanverkætlan um collagen og gelatin úr føroyskari rávøru

Á granskingarkjarnanum fyri evnafrøði og lívtøkni er eitt 1/2 ára starv í samband við eina PhD-undanverkætlan leyst at søkja. Arbeiðsstaður er Heilsufrøðiliga Starvsstovan. Undanverkætlanin fer fram í tøttum samstarvi við føroyska fiskivinnu.

Endamálið við PhD-undanverkætlanini er at leggja lunnar undir føroyskan førleika í almennari proteinevnafrøði og serliga collagen-evnafrøði. Í fyrsta umfari er málið at fáa fram vitan um fiska-collagen og gelatin úr føroyskari rávøru. Miðið er at fáa greiði á fylgjandi spurningum:

1. Hvør rávøra er atkomulig og hvørji krøv verða sett til hana.
2. Hvørjir vøruútdráttir kunnu framleiðast úr teimum ymisku ráværunum.
3. Hvør framleiðir fiska-collagen og gelatin.
4. Hvørjir eru marknaðirnir fyri teir ymisku collagen- og gelatinúrdráttirnar.
5. Hvørjir eru keypararnir og hvørji krøv seta teir t.d. til avtalur og skjalfesting.

Ætlanin er, at viðkomandi, sum fer í holt við undan-verkætlanina eisini heldur fram við sjálvari PhD-verkætlanini, ið vanliga tekur 3 ár. PhD-verkætlanin fer fram her á landi eins og á útlendskum universiteti við serkunnleika í collagen/gelatin evnafrøði.

Umsøkjarar skulu hava prógv í viðkomandi fakøki frá universiteti. Tey, ið eru ávegis við at gera kandidatuppgávu, eru eisini vælkomin at søkja.

Setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya.

Meiri fæst av vita um verkætlanina við at venda sær til granskingarleiðaran, Hóraldur Joensen, á teldupostadressuni: horaldurj@hfs.fo ella á 356487.

Umsóknarfreistin er 15. mars 2005. Umsóknir við prógvum, ævisøgu (curriculum vitae), viðmælum o. ø. skulu sendast í 4 eintøkum til:

**Granskingarkjarnin í evnafrøði og lívtøkni,**
Att.: Hóraldur Joensen
C/o Heilsufrøðiliga Starvsstovan
V. U. Hammershaimbsgøta 11
FO 100 Tórshavn
Føroyar

---

## Íverksetanarstudningur til listafólk

Mentanargrunnur Landsins letur einum listafólki íverksetanarstudning við støði í listaligum og fakligum metingum.

Íverksetanarstudningurin skal lætta um hjá evnaríkum listafólkum, serliga ungum, at koma víðari við teirra skapandi listaarbeiði. Studningurin kann nýtast til tilfar, leiga av atelier, námsferðir o.l.

Íverksetanarstudningurin er kr. 75.000,- árliga og kann í mesta lagi latast sama persóni í 2 ár.

**Umsóknir skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 1. apríl 2005.**

**Mentanargrunnur Landsins** - Tórgarðsgøtu 42 - FO-100 Tórshavn
Tlf. 32 08 42 - fartlf. 21 80 13 - fax 31 19 98
mentan@post.olivant.fo - **www.mentanargrunnur.fo**

---

Sosialurin
Sosialurin i




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 1044,**
P/F Heri Thomsen, 510 Gøta

**Viðtøkur broyttar:**
01.01.2005.
**Strikan av hjánavni:**
P/F H. T. Shipping (P/F Heri Thomsen)

Skráseting Føroya
tann 22. februar 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag móttikið fusiónsætlan samsv. § 134 a í P/F- lógini:**

**A. Navn:** P/F United Seafood (P/F-nr.2216), 100 Tórshavn.

**B. Navn:** P/F Faroe Seafood (P/F-nr.2452), 100 Tórshavn.

Harumframt hava vit móttikið váttan frá metingarmanninum samsv. § 134 c, stk. 4 í P/F-lógini.

Skráseting Føroya
tann 24. februar 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 220,**
P/F Einars Prent,
100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:**
Jona Paulina Malena Joensen, 100 Tórshavn.
**Innkomin í nevndina:**
Durið Eyðbjørnsdóttir, Leitisgøta 15, 160 Argir.

Skráseting Føroya
tann 28. februar 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3904,**
Sp/f Marjun Heimá - Bernina, 100 Tórshavn.

**Rætting:**

**Endamál:**
Endamál felagsins er at reka handilsvirksemi, keyp, søla og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya
tann 21. februar. 2005.

Kristin Balle